# FISKIMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting: 07-12-2020
Mál nr.: 19/00047
Málsviðgjørt: BL

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| **§ 12.** ... | Í § 12 verður sum stk. 6 sett:<br>"*Stk. 6.* Umboð fyri Føroya landfúta í Tilbúgvingarnevndum og felags Tilbúgvingarnevndum hevur ikki atkvøðurætt í kommunalum játtanarspurningum." |
| - | **§ 12 a.** Kommunurnar skulu áðrenn 1. januar 2022 hava skipað seg í kommunal tilbúgvingarøki, ið hava til endamáls at umsita kommunalu tilbúgvingina í avvarðandi kommunum.<br>*Stk. 2.* Kommunalu tilbúgvingarøkini skulu í mestan mun skipast samsvarandi hesum økjum:<br>1) Tilbúgvingarøkið Suðurstreymoy: Tórshavnar kommuna.<br>2) Tilbúgvingarøkið Vágar: Sørvágs kommuna og Vága kommuna.<br>3) Tilbúgvingarøkið Norðstreymoy: Vestmanna kommuna og Kvívíkar kommuna.<br>4) Tilbúgvingarøkið Sundalagið: Sunda kommuna og Eiðis kommuna. |

| | |
|---|---|
| | 5) Tilbúgvingarøkið Eysturoyar vestara:<br>Nes kommuna, Sjóvar kommuna og Runavíkar kommuna.<br>6) Tilbúgvingarøkið Eysturoyar eystara:<br>Fuglafjarðar kommuna og Eysturkommuna.<br>7) Tilbúgvingarøkið Norðoyggjar: Kunoyar kommuna, Viðareiðis kommuna, Klaksvíkar kommuna, Hvannasunds kommuna og Fugloyar kommuna.<br>8) Tilbúgvingarøkið Suðuroy: Sumbiar kommuna, Vágs kommuna, Porkeris kommuna, Hovs kommuna, Fámjins kommuna, Tvøroyrar kommuna og Hvalbiar kommuna.<br>9) Tilbúgvingarøkið Sandoy/Skúvoy: Skopunar kommuna, Sands kommuna, Skálavíkar kommuna, Húsavíkar kommuna og Skúvoyar kommuna.<br>*Stk. 3.* Kommunal tilbúgvingarøki, ið ikki eru samsvarandi økjunum í stk. 2, skulu taka fyrilit fyri, at økini eru landafrøðiliga og samferðsluliga samfeld.<br>*Stk. 4.* Kommunal tilbúgvingarøki, ið ikki eru samsvarandi økjunum í stk. 2, skulu hava í minsta lagi 4000 íbúgvar, tó kann gerast frávik í mun til talið av íbúgvum, um landafrøðilig viðurskifti tala fyri hesum. Landsstýrismaðurin tekur avgerð um møgulig frávik.<br><br>**§ 12 b.** Kommunur, sum 1. januar 2022 ikki hava skipað seg í kommunal tilbúgvingarsamstørv, verða av landsstýrismanninum skipað í kommunal tilbúgvingarsamstørv sambært § 12 a, stk. 2.<br><br>*Sjálvbodnar samstarvsavtalur*<br><br>**§ 12 c.** Kommunal samstørv, sambært § 12 a, skulu áðrenn 1. januar 2022 hava gjørt skrivliga avtalu sínámillum um skipan av samstarvinum, sambært § 8, stk. 2.<br>*Stk. 2.* Kommunur í einum samstarvsøki skipa samstarvið undir einari felags umsiting |

| | |
|---|---|
| | við felags tilbúgvingarnevnd og felags tilbúgvingarleiðara, sambært § 12, stk. 5.<br><br>**§ 12 d.** Til 1. januar 2022 kunnu einstøku kommunustýrini ikki uttan góðkenning frá landsstýrismanninum í tilbúgvingarmálum gera nýggjar avtalur ella broytingar í verandi avtalum av skipanarligum slagi á økinum, ella gera aðrar broytingar á økinum, ið kunnu fáa ávirkan á arbeiðið at skipa kommunurnar í kommunal tilbúgvingarøki sambært § 12 a." |
| **§ 13.** ...<br>*Stk. 1-2.* ...<br>*Stk. 3.* Uppskot til tilbúgvingarætlan og endurskoðan av ætlanini skal sendast landsstýrismanninum í tilbúgvingarmálum til viðmerkingar. Endaligar tilbúgvingarætlanir og endurskoðanir av ætlanini skulu sendast landsstýrismanninum í tilbúgvingarmálum til kunningar. | Í § 13, stk. 3 verður sum 3. pkt. sett:<br>"Tilbúgvingarætlanir skulu endurskoðast, tá umstøðurnar gera tað neyðugt og í minsta lagi innan fyri hvørt kommunalt valskeið." |
| - | Aftan á § 14 verður sum yvirskrift yvir § 14 a og § 14 a sett:<br><br>"*Fráboðanarsentralur*<br><br>**§ 14 a.** Landsstýrismaðurin kann áleggja kommununum at seta á stovn ein fráboðanarsentral, ið, vegna allar kommunur í Føroyum, skal taka ímóti boðum um eldsbruna og øðrum vanlukkum kring alt landið.<br>*Stk. 2.* Kommunurnar bera kostnaðin av kommunala fráboðanarsentralinum í mun til íbúgvaratalið í kommununi.<br>*Stk. 3.* Kommunali fráboðanarsentralurin skal mannast, riggast til og virka soleiðis, at hann til einhvørja tíð kann taka ímóti boðum, skráseta boðini, boða frá og samskifta við tilbúgvingarmanningina og við tann, ið boðar frá hendingini.<br>*Stk. 4.* Stovnseting og rakstur av kommunala fráboðanarsentralinum skal samskipast við alarmsentralarnar hjá løgregluni og heilsuverkinum.<br>*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann taka avgerð um virksemi, útgerð og rakstur av kommunala fráboðanarsentralinum. Harumframt kann landsstýrismaðurin seta |

| | |
|---|---|
| | krøv til manning og útbúgving av manning til kommunala fráboðanarsentralin." |
| **§ 15.** ... | Í § 15 verður sum stk. 3-5 sett:<br>"*Stk. 3.* Egintilbúgving, sambært stk. 1, skal vera nøktandi sambært váðameting kommununnar. Landsstýrismaðurin kann áleggja einum virksemi at økja um sína tilbúgving sambært stk. 1, so tilbúgvingin er nøktandi sambært váðameting kommununnar.<br>*Stk. 4.* Um eitt virksemi hevur við sær øktar útreiðslur til tilbúgving hjá kommununi, kann landsstýrismaðurin, við støði í kommunalu váðametingini, áleggja virkseminum at rinda hesar útreiðslur heilt ella lutvíst. Kommunan rindar tær útreiðslur, sum ikki verða álagdar virkseminum at rinda.<br>*Stk. 5.* Um virksemið sambært stk. 1 er staðsett í fleiri kommunum, kann landsstýrismaðurin, við støði í kommunalu váðametingini, áseta, hvørja tilbúgving hvør kommuna skal hava viðvíkjandi virkseminum." |
| - | Aftan á § 16 verður sum kapittul 4 a sett:<br><br>**"Kapittul 4 a<br>Kreppustýring**<br><br>**§ 16 a.** Skipað verður eitt Kreppuráð, sum skal virka sum millumlið millum politiska myndugleikan og samskipandi leiðsluna av einari størri hending ella kreppu á landi ella á sjógvi.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð reglur um virksemi Kreppuráðsins, og hvussu Kreppuráðið verður mannað.<br><br>**§ 16 b.** Skipað verður eitt Átaksráð, sum skal virka sum millumlið millum skaðastaðsleiðsluna og Kreppuráðið.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð reglur um virksemi Átaksráðsins, og hvussu Átaksráðið verður mannað." |
| - **§ 18.** Allir partar í tilbúgvingini hava skyldu at samstarva. | § 18 verður orðað soleiðis:<br><br>"**§ 18.** Hvør landsstýrismaður kann, fyri sítt ábyrgdarøki, áleggja myndugleikum og starvsfólki í hesum, og áleggja almennum og privatum virksemi, og starvsfólki í hesum, at |

| | |
|---|---|
| | veita hjálp at leggja til rættis ella at útinna uppgávur innan tilbúgvingina.<br>*Stk. 2.* Hava kravboð eftir stk. 1 við sær fíggjarligt tap fyri vinnuligt virksemi, skal landið rinda endurgjald eftir vanligum reglum. Endurgjald kann ikki krevjast, um kostnaðurin av at fremja kravboðini kann fíggjast við at áseta prís á viðkomandi vøru ella tænastu. Tey, sum hava virksemi, skulu ikki av hesum vera verri fyri enn onnur í somu vinnugrein." |
| - | Aftan á § 20 verður sum § 20 a sett:<br><br>"**§ 20 a.** Landsstýrismaðurin kann gera av, hvør samskiftisútgerð skal brúkast til tvørfakligt samskifti hjá pørtunum í tilbúgvingini." |
| § 42. Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður tann revsaður við bót, ið<br>1) brýtur § 29 ella § 31, stk. 2,<br>2) sum ikki ger eftir boðum ella forboðum sbrt. § 16, stk. 1, § 30, stk. 1, § 31, § 32, § 33, § 37, stk. 2 ella § 38, ella<br>3) sum uttan loyvi setir á stovn, umbyggir, umvælir, økir, tekur niður ella broytir raksturin av virksemi sbrt. § 37, stk. 1. | Í § 42, stk. 1, nr. 2 verður aftan á "forboðum sbrt." sett: "§ 15, stk. 3 og 4,". |

**Fylgiskjal 2**

## Kommunala tilbúgvingin pr. 1. jan. 2022 (Tøl frá 1/1-18)

### Klaksvíkar Sløkkilið (5.653)

| | |
|---|---|
| **FUGLOYAR KOMMUNA** | **37** |
| - Hattarvík | 12 |
| - Kirkja | 25 |
| **VIÐAREIÐIS KOMMUNA** | **356** |
| - Viðareiði | 356 |
| **HVANNASUNDS KOMMUNA** | 414 |
| - Depil | 1 |
| - Hvannasund | 245 |
| - Múli | 0 |
| - Norðdepil | 166 |
| - Norðtoftir | 2 |
| **KLAKSVÍKAR KOMMUNA** | **5117** |
| - Klaksvík | 4777 |
| - Árnafjørður | 64 |
| - Norðoyri | 109 |
| - Ánirnar | 60 |
| - Mikladalur | 23 |
| - Trøllanes | 14 |
| - Svínoy | 26 |
| - Húsar | 38 |
| - Syðradalur, Kalsoy | 6 |
| **KUNOYAR KOMMUNA** | **143** |
| - Haraldssund | 70 |
| - Kunoy | 73 |
| **Samanlagt:** | **5653** |

### Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið (6.258)

| | |
|---|---|
| **NES KOMMUNA** | **1283** |
| - Nes, Eysturoy | 342 |
| - Saltnes | 124 |
| - Toftir | 817 |
| **RUNAVÍKAR KOMMUNA** | **3950** |
| - Oyndarfjørður | 142 |
| - Elduvík | 16 |

| | |
|---|---|
| - Funningsfjørður | 56 |
| - Æðuvík | 100 |
| - Glyvrar | 413 |
| - Lamba | 142 |
| - Rituvík | 284 |
| - Runavík | 537 |
| - Saltangará | 1001 |
| - Skipanes | 54 |
| - Søldarfjørður | 345 |
| - Lambareiði | 6 |
| - Skála | 686 |
| - Skálabotnur | 122 |
| - Funningur | 46 |
| **SJÓVAR KOMMUNA** | **1025** |
| - Innan Glyvur | 75 |
| - Kolbeinagjógv | 34 |
| - Morskranes | 32 |
| - Selatrað | 43 |
| - Strendur | 841 |
| **Samanlagt:** | **6258** |

**Kommunala tilbúgvingin fyri Suðuroy (4.610)**

| | |
|---|---|
| **HVALBIAR KOMMUNA** | **682** |
| - Hvalba | 602 |
| - Sandvík | 80 |
| **TVØROYRAR KOMMUNA** | **1718** |
| - Froðba | 270 |
| - Trongisvágur | 521 |
| - Tvøroyri | 840 |
| - Øravík | 33 |
| - Øravíkslíð | 54 |
| **HOVS KOMMUNA** | **98** |
| - Hov | 98 |
| **PORKERIS KOMMUNA** | **313** |
| - Porkeri | 313 |
| **VÁGS KOMMUNA** | **1363** |
| - Vágur | 1363 |
| **SUMBIAR KOMMUNA** | **357** |
| - Lopra | 86 |
| - Sumba | 256 |
| - Víkarbyrgi | 0 |

| | |
|---|---|
| - Akrar | 15 |
| **FÁMJINS KOMMUNA** | **79** |
| - Fámjin | 79 |
| **Samanlagt** | **4610** |

**Tórshavnar Sløkkilið (21.114)**

| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR KOMMUNA** | **21114** |
| - Kollafjørður | 794 |
| - Oyrareingir | 43 |
| - Signabøur | 139 |
| - Argir | 2140 |
| - Tórshavn | 13123 |
| - Kaldbak | 238 |
| - Kaldbaksbotnur | 11 |
| - Mjørkadalur | 0 |
| - Sund | 2 |
| - Hvítanes | 108 |
| - Hoyvík | 3942 |
| - Norðradalur | 12 |
| - Syðradalur, Streymoy | 9 |
| - Kirkjubøur | 75 |
| - Velbastaður | 236 |
| - Hestur | 25 |
| - Koltur | 1 |
| - Nólsoy | 216 |

**Kommunala tilbúgvingin fyri Húsavíkar-, Skálavíkar-, Sands-, Skopunar- og Skúvoyar kommunur (1.284)**

| | |
|---|---|
| **SKOPUNAR KOMMUNA** | **468** |
| - Skopun | 468 |
| **SANDS KOMMUNA** | **520** |
| - Sandur | 520 |
| **SKÁLAVÍKAR KOMMUNA** | **142** |
| - Skálavík | 142 |
| **HÚSAVÍKAR KOMMUNA** | **112** |
| - Dalur | 34 |
| - Húsavík | 66 |
| - Skarvanes | 12 |
| **SKÚGVOYAR KOMMUNA** | **42** |
| - Skúvoy | 32 |

| | |
|---|---|
| - Stóra Dímun | 10 |
| **Samanlagt:** | **1284** |

**Kommunala tilbúgvingin fyri Sørvágs- og Vága kommunu (3.233)**

| | |
|---|---|
| **VÁGA KOMMUNA** | **2057** |
| - Sandavágur | 907 |
| - Miðvágur | 1108 |
| - Vatnsoyrar | 42 |
| **SØRVÁGS KOMMUNA** | **1176** |
| - Sørvágur | 1078 |
| - Bøur | 69 |
| - Gásadalur | 13 |
| - Mykines | 16 |
| Samanlagt: | **3233** |

**Kommunala tilbúgvingin fyri Kvívíkar- og Vestmanna kommunu (1.825)**

| | |
|---|---|
| **KVÍVÍKAR KOMMUNA** | **596** |
| - Kvívík | 380 |
| - Leynar | 111 |
| - Skælingur | 13 |
| - Stykkið | 41 |
| - Válur | 51 |
| **VESTMANNA KOMMUNA** | **1229** |
| - Vestmanna | 1229 |
| Samanlagt: | **1825** |

**Kommunala tilbúgvingin fyri Fuglafjarðar- og Eysturkommunu (3.624)**

| | |
|---|---|
| **FUGLAFJARÐAR KOMMUNA** | **1540** |
| - Fuglafjørður | 1527 |
| - Hellurnar | 13 |
| **EYSTURKOMMUNA** | **2084** |
| - Leirvík | 937 |
| - undir Gøtueiði | 29 |
| - Gøtugjógv | 37 |
| - Í Skálafirði | 0 |
| - Norðragøta | 642 |
| - Syðrugøta | 439 |
| **Samanlagt:** | **3624** |

**Kommunala tilbúgvingin fyri Eiðis- og Sunda kommunu (2.740)**

| | |
|---|---|
| **EIÐIS KOMMUNA** | **720** |
| - Eiði | 645 |
| - Ljósá | 28 |
| - Svínáir | 47 |
| **SUNDA KOMMUNA** | **1750** |
| - Norðskáli | 319 |
| - Oyrarbakki | 163 |
| - Oyri | 155 |
| - Gjógv | 32 |
| - Haldórsvík | 120 |
| - Langasandur | 36 |
| - Tjørnuvík | 53 |
| - Saksun | 8 |
| - Hvalvík | 245 |
| - Nesvík | 0 |
| - Streymnes | 297 |
| - Hósvík | 322 |
| Samanlagt: | **2470** |

**Kreppustýring í Føroyum**




*Mynd: Kreppustýringin í Føroyum. Grøni geirin lýsir skipan í sambandi við tilburðir á landi, blái geirin lýsir skipan í sambandi við tilburðir á sjónum, og reyði geirin lýsir tvørfakliga samstarvið á operativum (stýrandi) og strategiskum (ráðandi) stigi.*